# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Joen Magnus abbi 75 ár



Hesin fitti abbin fyllir 75 ár sunnudagin 3. juli.

Dagurin verður hildin á Bøgøtu 3 í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag leygardagin tann 2. juli klokkan 19. Øll eru hjartaliga vælkomin at gleða abba.

Góði abbi, hjartaliga til lukku við føðingardegnum.

**Heilsan abbabørnini**

## 75 ár



Fríggjadagin 1. juli verður Torleif Bech í Porkeri 75 ár. Foreldrini vóru Johanna Bech f. Jensen av Strondum og Jacob M. Bech í Hólinum, Porkeri.

Torleif er næstyngstur av 10 systkjum, og nú eru tey bert trý eftir á lívi.

Sum 14 ára gamal byrjaði Torleif at rógva út við pápanum, og stutt eftir at seinri verðaldarbardagin var lokin, fór hann til skips á fyrsta sinni við "Yvonnu" úr Vági, sum Daniel Larsen í Gjørðum í Porkeri førdi.

Seinri var hann eitt skifti við trolaranum "Beinisvørð", og síðani við snurruváðsbátinum "Ósi", sum pápi hansara átti saman við øðrum porkeningum.

Eitt skifti í 1950 árunum sigldi hann við íslendskum trolarum, og tá trolarin "Vágbingur" í 1959 kom til landið, var Torleif ein av eigarunum, og við Vágbingi sigldi hann í fleiri ár.

Síðani var hann í fleiri á við norsku Longvátrolarunum, inntil hann í fyrru helvt av 1970 árunum fór við "JENS Christian Svabo" og síðani við "Magnus Heinason", og tá Fiskirannsóknarstovan fór undir royndarveiði eftir svartkjafti við "Leivur Øssurson", var Torleif við honum.

Torleif hevur altíð havt stóran áhuga fyri seyði, og hann hevur serstakar gávur til at kenna seyð.

Hann hevur verið seyðamaður í Handara Parti í eitt langt áramál, og hevur heilt frá ungum av gingið nógv í haganum og er tí ein av teimum, sum hevur gott skil á staðarnøvnum uttangarðs og veit eisini nógv at siga frá.

Hóast heilsan nú ikki er tann besta, so er tað seyðurin, sum hann framvegis fjálgar um og hevur stóra gleði av.

Í dec. verða 50 ár síðani Torleif giftist við Julinu, sum er ættað Innan Glyvur, og tey eiga fýra børn:

Jónhild, Johanna, Marjun og Jákup Eli og tvær abbadøtur: Sandra og Liljan.

Vit ynskja Torleif hjartaliga tillukku á 75 ára føðingardegnum og blíðan byr framyvir.

**Vinur**

### Dagurin 1. juli

Teobaldus, deyður í 1066. Franskur aðalsmaður, ið á ungum árum velur eitt lív sum einabúgvi. Var fyrst í Luksemburg, ger so pílagrímsferð til Santiago de Compostela í Norðurspaniu, til Róm og fær sær at enda tilhald í Vincenza í Italiu, har hann varð prestvígdur.

### Juli

Sjeyndi mánaður hevur navn sítt eftir Juliusi Caesari. Í gamla rómverska kalendaranum varð hann róptur Quintilis, ið merkir tað, sum hoyrir til tann fimta (mánaðin). Tann fimti var her roknaður frá mars, ið var tann fyrsti. Í árinum 45 f.o.t. samtykti rómverska senatið at geva Quintilis navnið juli, Juliusi Caesari til heiðurs, tí hann fekk í lag tann nýggja kalendaran.

## 25 góð ár hjá PM



*- Eg havi bara arbeitt her hjá PM, sigur Gunnar Mohr, sum í dag hevur 25 ára starvsdag*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Ja, tað hava verið 25 góð ár. Eg havi trivist sera væl, sigur Gunnar Mohr í Havn.

Í dag, 1. juli fyri 25 árum síðani hevði hann sín fyrsta dag í starvi hjá Poul Michelsen í Havn.

Hetta ætlar fyritøkan sær eisini at hátíðarhalda við móttøku seinnapartin í dag frá kl. 15 til 18.

Gunnar Mohr tók realprógv frá Tórshavnar Kommunuskúla, og byrjaði eftir hetta beinanvegin á goymsluni hjá PM. Hann hevur síðani verið gjøgnum alt systemið í fyritøkuni: Hann hevur fingið sær kontórútbúgving á staðnum, hann hevur verið formaður í goymsluni og hann hevur eisini verið innkeypsleiðari.

Í dag er hann sølustjóri í fyritøkuni.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Tøkk

Hjartans tøkk øll tit, sum gjørdu 70 ára føðingardagin hjá mær so hugnaligan.

**Regin á Rógvi**

## Ólavsøkukórið møtir aftur til venjing

**Havn:** Líka so nátúrlig sum ólavsøkan er einaferð um árið, so eru venjingarnar hjá ólavsøkukórinum tað eisini.

Hetta kórið setur hvørt einasta ár ein heilt serstakan dám á tjóðarhátíð okkara. Og soleiðis er eisini ætlanin at gera í ár. Men eingin sangur uttan venjing.

Fyrstu venjingarnar til hetta – vónandi – stóra kórið verða nú sunnudagin í Kommunuskúlaaluni kl. 16 og einar tríggjar tímar fram. Onnur venjingin verður sunnudagin fyri ólavsøku, 24. juli somu tíð.

Miðað verður eftir at fáa eitt eins stórt kór og í fjør, tá tað var rættiliga væl mannað. Í ár er tó serliga tørvur á mannfólki til verkið, ið syngjast skal.

Fyrireikararnir hava nevniliga ætlan um at syngjast skal tann góða gamla ólavsøku-kantatan hjá Waagstein og Mitens frá 1930, og til hesa krevst nevniliga eitt gott og fulltónað manskór.

Sungið verður eisini úr bláu føroysku kórbókini, og tí verður heitt á sangararnar um at taka hesa við til venjingina nú sunnudagin.

**sb.**